# Teir átta risarnir

*Neyvan hevur kappingin, Atlantic Gian, nakrantíð verið so hørð, sum hon er í ár. Allir átta luttkararnir hava verið finalistar í kappingini um at gerast heimsins sterkasti, og millum luttakararnar eru tveir av vinnarunum seinastu trý árini*

JÁKUP MØRK/
RÚNI HØGFELDT

Átta mans fara aftur í ár at kappast um at gerast Atlantic Giant, og tað er neyvan at taka munnin ov fullan, tá sagt verður, at feltið ongantíð hevur veirð so sterkt áður.

Allir átta luttakararnir hava verið finalistar í kappingini um at gerast heimsins sterkasti, so lætt verður tað ongan hátt hjá einum komandi vinnara.

Niðanfyri hava vit, við hjálp frá Regini Vágadal, gjørt eina lítla lýsing av einstøku luttakarunum.




*Tveir av risunum, íslendski Tórfi Ólafson og føroyski Regin Vágadal, eru her avmyndaðir úti á Skansanum, har seinastu fýra kappingarnar verða avgreiddar*

***Mynd: Jonhard Hammer***

**Tórfi Ólafson, Ísland**

35 ára gamli íslendingurin, sum dagliga arbeiðir við menningartarnaðum børnum, er giftur og hevur fýra børn.

Seinastu árini hevur hann javnan luttikið í kappingum fyri sterkar menn, og tvær ferðir er hann komin í finaluna í kappingini um at gerast heimsins sterkasti.

Sum áskoðararnir helst minnast frá kappingini í fjør, so er Torfí ein sannur meistari í at fáa áskoðarafjøldina við sær, tá kappast verður. Hann ger snøgt sagt kappingina til eitt show.

Kappingargreinin, sum hann avgjørt stendur seg best í, er tá barst verður við viðarbulum, men hendan kappingin er ikki við í Atlantic Giant í ár.

**Rene Minkwitz, Danmark**

Eftir at Flemming Rasmussen nú roynir seg hjá øðrum sambandi í kappingum fyri sterkar menn, er tað nú serliga Rene Minkwitz, sum umboðar Danmark í hesum sambandi.

31 ára gamli danin telist við sínum 190 sentimetrum og 150 kiloum millum teir stóru menninar í kappingini. Stødd hansara ger eisini, at hann ikki er millum fimastu luttakararnar, men haraftur-ímóti er hann ógvuliga drúgvur til aðrar lutir.

Sambært Regini er tað serliga tá lyftast skal upp um høvd, og tá ting skulu togast, at Rene stendur seg væl.

Umframt at hann í fjør vann kappingina um at gerast heimsins sterkasti, taldist Rene millum finalistarnar, tá kappingin um at gerast heimsins sterkasta varð hildin fyri knøppum mánaði síðani.

**Hubert Dorer, Eysturríki**

Við sínum 34 árum telist Hubert Dorer ikki millum teir mest royndu luttakararnar í kappingini. Einki er tó at taka seg aftur í, at talan her um ein mann, sum fer at gera rættuliga nógv um seg í styrkiskappingum komandi árini.

Áðrenn hann fór upp í kappingar av hesum slag, varð hann heimsmeistari í styrkislyfting, og eitt nú megnaði hann í fjør at vinna seg fram til finaulumfarið í kappingini um at gerast heimsins sterakasti.

Við fortíð sínari úr styrkislyfting undrar tað ikki, at sterkasta síða hansara er. tá lutir skulu lyftast og haldast, so sum í eitt nú deadlift, har roknast kann við, at hann fer at teljast millum fremstu íðkararnar.

**Janne Virtanen, Finnland**

Skal nakar favorittur takast fram um, tá mett verður um ymsu luttakararnar, er einki at ivast í, at hesin verður Janne Virtanen. Eftir at hann í fjør gjørdist nummar tvey í kappingini um at gerast heimsins sterkasti, eydnaðist tað honum í Suðurafrika at vinna heitið, og sjálvsagt fer hann eisini eftir sigrinum í hesi kapping.

Finnar hava eina stolta siðvenju í hesum kappingum, og millum annað var vinnarin í fjør eisini finni.

Sterku síðurnar hjá heimsins sterkasta manni eru sjálvsagt fleiri, men serliga eru tað kappingargreinarnar, sum snúgva seg um úthaldni, sum Janne er drúgvur í. Nakað sum ivaleyst kemur honum til góðar, tá seinna kappingin í dead-lift verður.

Harumframt hevur hann so at siga ongar veikar síður, og megnar tí nærum altíð at halda sær í ovara enda av stigatalvuni.

**Bob Dickson, Ongland**

Hóast hann ikki er nakar lítil maður, so er bretin minstur av risunum, sum fara at kappast í morgin.

Bob taldist millum teirra, sum vann sær veg fram til finaluumfarið í Suðurafrika, men orsakað av skaða, fekk hann ikki gjøgnumført kappingina. Regin veit tí ikki so nógv at siga um hendan luttakaran, og hvørjar hansara sterku og veiku síður eru.

Hann er ikki so kendur á heimspallinum, men hevur í fleiri ár luttikið í kappingum í Onglandi, og ber hann eisini heitið, sum sterkasti maðurin har.

**Lasló Fekete, Ungarn**

42 ára gamli ungarin er stóri veteranurin í kappingini, og hóast úrslit hansara hava verið misjøvn gjøgnum árini, sohevur hann altíð havt fjøldina aftan fyri seg. Lasló er nevnliga kendur fyri at flenna hart, meðan hann kappast við hinar luttakararnar.

Hóast hann seinnu árini er líkasum yvirhálaður av yngru kappingarneytum, so er hann framvegis sera virkin innan ítrótt sína, og hann kann eisini líta aftur á tríggjar finalusessir í kappingini um at gerast heimsins sterkasti.

Áðrenn hann fór at kappast í styrki, var Lasló ein kendur hondbóltsleikari í heimlandi sínum, og helst er tað frá hesum, at hann eisini er sera sterkur, tá lutir skulu tveitast.

**Magnus Samuelson, Svøríki**

30 ára gamli sviin varð fyrsti maðurin, sum slapp at rópa seg Atlantic Giant. Hetta var í 1998, tá hann gjørdist ein sannførandi vinnari av fyrstu kappingini.

Sama ár vann hann, sum fyrsti sviin nakrantíð, kappingina um at gerast heimsins sterkasti, og umframt hetta hevur hann eisini vunnið fleiri aðrar kappingar, og hevur millum annað verið sterkasti maður í Svøríki fleiri ár á rað.

Dagliga starvast Magnus sum bóndi á egna garði sínum í svøríki, so nakað av venjing fær hann eisini í gerandisdegi sínum.

Hann er sera góður í kappingargreinum, sum krevja ferð, fimi og teknik, og Umframt at hava verið heimsins sterkasti maður, hevur Magnus eisini verið europameistari í sjómanstaki.

**Regin Vágadal, Føroyar**

6,1/287

Tann luttakarin, sum stendur ovast á plakatini, men sum vit her hava sett seinast, er føroyski risin, Regin Vágadal. At vit hava sett hann niðast í hesum yvirlitinum merkir tó ikki, at vit á nakran hátt rokna við, at hann fer at enda aftastur av luttakarunum. Tvørturímóti er vónin sjálvsagt, at Regin fer at standa seg eins væl, ella kanska betri, enn hann gjørdi í fjør, tá talan varð um silvurpláss.

Tá kappast varð á fyrsta sinni um at gerast Føroya sterkasti maður, í 1995, eydnaðist tað Regini at vinna kappingina. Ein partur av vinninginum var luttøka í líknandi kapping uttanlands, og hóast mong høvdu hug at smílast til hetta, so tók Regin øll á bóli, tá hann gjørdist nr. 2 í eini kapping í Skotlandi.

Ikki bara her heima varð lagt til merkis, hvussu væl Regin stóð seg, og hann varð eisini boðin við til at kappast um at gerast heimsins sterkasti. Aftur her gekk alt upp á stás, og í fyrstu roynd sínari eydnaðist føroyska risanum at vinna seg fram til finaluumfarið.

Umframt at hann síðani hetta hevur luttikið í fleiri altjóða kappingum, hevur Regin aftur í ár megnað at vunnið seg fram til finaluumfarið, men eins og 1996 mátti hann hálvskaddur taka til takkar við einum plássi aftarliga í røðini.

Treiskni hansara hevur tó altíð verið stórt, og báðu ferðirnar hevur hann tó megnað at fullført kappingina, hóast skaðin av røttum átti at viðført, at hann gavst í kappingini.

Regin er vanliga sera sterkur í teimum styrkisroyndum, sum krevja skjótleika, og í so máta hóskar kappingin um at gerast Atlantsrisin rættuliga væl til Regin. Um hetta er nóg mikið til at tryggja honum fremsta plássið fæst so at vita leygardagin, men einki er at ivast í, at stuðulin frá áskoðarunum verður sera dyggur.

**Er væl fyri**

Sjálvur sigur Regin undan kappingini, at hann er sera væl fyri í løtuni. Einki er at siga til, at tað er við stórum spenningi, at hann riggar seg til kappingina í heimlandinum, og hann hevur so ongar ætlanir um at svíkja vónríku áskoðarafjøldina, sum vil hava hann upp á ovastu rók.

Um skaðan, sum hann fekk í økslina í kappingini í Suðurafrika, sigur Regin, at hann framvegis er har, men at hetta tó ikki sær út til at bila:

- Eg vandi nakað í gjár (fyrradagin blðm.), og tá sá tað út til, at skaðin ikki fór at gera um seg, so eg rokni við, at tað fer at ganga.

Annars heldur hann um sjálva kappingina, at hon hóskar sera væl til sín:

Standi eg meg væl áðrenn vit fara út á Skansan til seinastu kappingarnar, rokni eg við, at eg havi ein sera góðan møguleika at gera meg galdandi. Allar fýra kappingargreinarnar á Skansanum eru greinar, sum eg vanliga standi meg væl í, og millum annað havi eg vant sera nógv Wheel-Flip, sum eg annars ikki havi verið so góður til.

- Fyrsta árið varð eg nummar 6, í fjør nummar 2, so í ár skal tað verða eitt fyrsta pláss, sigur ein spentur Regin Vágadal at enda.

So er bara hjá áskoðarunum at gera sítt til, at Regin kann røkka ovastu tindunum leygardagin. Fyrimunurin av heimavølli eigur at koma til sjóndar, og tað hevur áður verið sjónligt, at hetta kann hjálpa til, so føroyski risin fær givið seg tað allarseinasta pettið, tá kappast verður.






*Fríggjamorgunin fingu luttakararnir nágreinuiga at vita, hvussu farið verður fram í ymsu kappingunum, so nú er alt klárt til leygarmorgunin, tá farið verður undir kappingina*

***Mynd: Jakup***

# Alt er klárt hjá Regini

*Triðja árið á rað fáa føroyingar høvi at síggja nakrar av heimsins sterkastu monnum dystast, og líkt er til, at menninir í ár eru sterkari enn teir nakrantíð hava verið*

JÁKUP MØRK

Leygardagin fara átta sterkir menn at kappast um at gerast sonevndi atlantsrisin.

Fríggjamorgunin vóru hesir savnaðir uppi á Hotel Føroyum, har høvuðsdómarin greiddi frá, hvussu kappingin var fyriskipað.

Høvuðsdómari er annars Jamie Reeves, sum í nógv ár taldist millum sterkastu menn í heiminum, og hóast hann nú er givin við ítróttini sum íðkari, so er hann framvegis aktivur sum dómari og hjálparmaður.

Eitt, sum Jamie legði sera stóran dent á, var hvussu væl kappingarnar hjá Regini hava verið fyriskipaðar. Harumframt legði hann eisini dent á føroyskan matin, og kallaði hann millum annað fyri »second to none«, altso einki er betri.

Niðanfyri verður annars greitt eitt sindur frá, hvussu ymsu kappingarnar fara fram, umframt at lutakastið av nummarrøðini hjá luttakarunum eisini er prentað.

**Regin er nýskapandi**

Byrjað verður leygarmorgunin uppi á Hotel Føroyum, har ein kappingargrein stendur á skránni. Um 10'tíðina ella so verður farið oman í Miðbýin, har tríggjar tær næstu kappingarnar skulu avgreiðast, og endiliga verður farið út á Skansan, har seinastu fýra kappingarnar eru.

Tað er ikki heilt ókent, at tey tiltøk, sum Regin Vágadal er partur av, hava okkurt óvanligt á skránni. fyri fáum árum síðani hevði hann Stevie Starr, ein einari á sínum øki, við undir eini kapping, og fyri teir áskoðarar, sum sóu hetta, var talan um eitt minni fyri lívið. Slík framførsla hevði ongantíð áður verið sædd í Føroyum, og verður tað neyvan aftur í bræði.

Hesu ferð fáa føroyingar fyri fyrstu ferð høvi at upplivað fallskýggjaútlop, og verður hetta gjørt úti á Skansanum, meðan finalan fer fram.

Atgongumerki til avgerandi kappingarnar úti á Skansanum kostar 150 kr. fyri vaksin, meðan børn rinda 50 kr. Kappingarnar við Hotel Føroyar og í Miðbýnum eru ókeypis.

Niðanfyri verður stutt greitt frá ymsu kappingunum, sum altso allar verða leygardagin.

**Trucktowing**

9.00 við Hotel Føroyar

Eins og navnið sigur, er her talan um at togað ein lastbil. Sterku menninir halda øðrum endanum, meðan hin er festur í lastbilin, og so ræður um at nýta so stutta tíð sum gjørligt, um at flyta lastbilin ein ávísan tein. Luttakararnir fáa 60 sekundir hvør, og er lastbilurin ikki togaður allan teinin innan hetta, verður mált, hvussu nógvar metrar talan er um.

**Húsafell-stone**

10.00 við býráðshúsið

Fyrstu ferð kappast varð í hesum var í fjør, tá Regin var næstbestur av teimum átta luttakarunum. Húsafellssteinurin, sum vigar á leið 190 kg., skal lyftast, og síðani berast eftir vøllinum eystan fyri býráðshúsið. Vinnarin er sjálvsagt tann, sum nýtir minst tíð um teir 30 metrarnar. Í øðrum lagið verður eftir, hvussu langt teir megna at bera steinin.

**Deadlift**

Í deadlift ræður um at lyfta so tunga byrðu sum gjørligt. Eftir fyrsta lyftið, hevur hvør luttakari fýra royndir, og so at siga avgera teir sjálvir, nær teir nýta hesar royndir. Treytin er tó, at byrðan ongantíð gerst lættari at lyfta, og tí hevur taktiski parturin ein ógvuliga stóran leiklut í hesi kapping.

**Millwalk**

í Klingruni

Nýggja Klingran er sum skapt til at kappast í Millwalk. Her verður ein vekt upp á 400 kg fest í eina stong, sum melur runt um ein aksil at kalla. Síðani ræður um at lyfta stongina upp í føvningin, og síðani bera hana so oftani runt sum yvirhøvur gjørligt. Vinnarin er so tann, sum megnar at ganga longsta teinin samanlagt.

Vanliga stendur Regin seg væl í hesi kapping, og í fjør gjørdist hann nr. 2 í hesum.

**Loading event, stones**

16.00 úti á Skansanum

Hetta er vælkenda styrkisroyndin, har 5 steinar, hvør tyngri enn annar, skulu lyftast upp á sín sess. Í fyrstu atløgu ræður um at lyfta allar steinarnar upp á pláss, og í aðru atløgu skal hetta gerast so skjótt sum yvirhøvur gjørligt.

Í kappingini um at gerast heimsins sterkasti forðaði skaðin Regini í at gera seg galdandi í hesi kapping, men vónandi fer hetta ikki at henda úti á Skansanum. Hetta er nevnliga ein av sterkastu síðunum hjá Regini, og vann hann eisini hesa kappingargreinina í fjør.

**Wheel Flip**

Úti á Skansanum

Fyri áskoðararnar er hetta ein av teimum heilt stuttligu kappingargreinunum, tí serliga er tað ferðin, sum her er avgerandi. Tveir og tveir kappast luttakararnir um, hvussu skjott teir megna at flyta eitt stórt dekk yvir eitt ávíst strekki. Hetta verður gjørt við at bólta dekkið frameftir.

Tá hann ikki er av størstu monnum (í hesum sambandi) hevur hetta ikki verið millum sterkastu síðurnar hjá Regini. Hann hevur tó vant hetta sera nógv í seinastuni, og sjálvur sigur hann seg vera nógv betri í hesum nú, enn hann áður hevur verið.

**Deadlift, hold**

Úti á Skansanum

Eins og í deadlift, er her talan um at lyfta tungar vektir upp frá. Tá talan er um »hold« er tað tó í nógv størri mun úthaldni, sum ger seg galdandi. Talan er nevnliga um at lyfta 500 kg upp frá, og síðani skulu hesi haldast uppi longst gjørligt.

Vanliga stendur Regin seg væl í hesum, men eisini fleiri av hinum luttakarunum eru sera sterkir í hesum. Skaðin hjá Regini kom í eini líknandi kapping í Suðurafrika, so fyri føroysku vónirnar er avgerandi, er Regin kemur heilskapaður burtur úr hesum.

**Loading event, kegs**

Úti á Skansanum

Aftur er her talan um eina væl kenda kapping, sum samstundis eisini er sera undirhaldandi fyri fjøldina.

Eitt ávíst tal av kaggum skal flytast úr einum staðið til annað, og hetta skal sjálvsagt gerast so skjótt sum yvirhøvur gjørligt.

Vónandi hevur Regin staðið seg væl, tá komið er til hesa kappingargrein, tí fáur, um nakar, megnar hetta eins væl og Regin. Eitt nú verður á heimasíðuni hjá sterku monnunum tikið til, at eingin í heiminum tekur Regin á hesum øki.

Hetta kom eisini til sjóndar í fjør, tí hóast bæði Jouko Ahola og Magnus Samuelson vóru nær við, so megnaði hvørgin teirra at skumpað Regin av fremsta plássinum í hesum.

**Raðfylgjan**

Á tíðindafundi uppi á Hotel Føroyum í gjár, greiddi høvuðsdómarin, Jamie Reeves, frá, hvussu ymsu kappingarnar eru fyriskipaðar.

Hóast allir hava roynt seg í hópin av líknandi kappingum, eru altíð spurningar um onkrar smálutir, og tí er týdningarmikið, at eingi ivamál eru, tá kappast verður.

Eftir at kappingargreinarnar sostatt vóru gjøgnumgingnar hvør sær, varð at enda boðað frá, í hvørjari raðfylgju kappast verður.

Tað er nevnliga soleiðis, at í hvørjari grein, er tað aftasti maðurin í samlaðu støðuni, sum roynir seg fyrst, soleiðis at spenningurin verður varveittur sum longst.

Til fyrstu kappingina er tó neyðugt við lutakasti, og her kann ikki sigast, at Regin varð serliga heppin.

Hann verður nevnliga fyrsti maðurin, sum skal í eldin, tá lastbilatoganin stendur á skránni. Vónandi er hetta einasta ferð, at Regin verður fyrsti maður at royna seg, tí vit vilja heldur hava hann í hinum endanum.

Raðfylgjan gjørdist annars hendan:

1 Regin Vágadal
2 Tórfi Ólafson
3 Magnus Samuelson
4 Hubert Dorer
5 Janne Virtanen
6 Lasló Fekete
7 Rene Minkwitz
8 Bob Dickson



*Regin tóktist ikki vera ovurfegin um lutakastið. Hann verður fyrstur av luttakarunum at royna seg*

***Mynd: Jákup***